# Eingin sáttmáli í Íslandi

**Mortan Hansen var óheppin at keiggja sær fótin, og tí gjørdist tað ongan tíð aktuelt at tosa um nakran sáttmála**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu fyri einari viku síðani, so hevur strikuspælarin hjá Tjaldrinum og landsliðnum, Mortan Hansen, seinastu vikuna verið í Íslandi, har hann hevur roynt at spælt seg til ein sáttmála við Þór í bestu íslendsku hondbóltsdeildini.

### Skaddur

Í hesum umfarinum verður tað tó av ongum við ætlaða sáttmálanum. Mortan skuldi sum partur av royndarvenjingini taka lut í eini kapping, har fleiri av bestu íslendsku feløgunum tóku lut, men longu í fyrsta dysti sínum var hann so óheppin at meiða sær fótin.

- Eg hevði sitið á beinkinum allan tann fyrsta dystin, sum liðið hevði spælt, men tá vit so fríggjadagin spældu móti Fram, slapp eg at byrja inni. Ta einu ferðina í dystinum skuldi eg royna meg við hoppiskoti, tá eg fekk eitt skump, og tíverri kom eg somikið skeivt niður, at eg keigdi fótin. Fótliðið gjørdist alt fyri eitt hovið, so nú er helst talan um ein steðg upp á einar tvær til tríggjar vikur, sigur Mortan sjálvur um óhappið, og tað er ikki sørt, at hann harmast um hetta.

- Eg skal ikki siga, at eg hevði roknað við nøkrum sáttmála. Tað kom so ongan tíð upp á tal, nú skaðin kom, men eg haldi tó, at tað gekk hampuliga væl hjá mær. Teir royndu eisini at spyrja, hvussu eg treivst, og um eg hevði trupulleikar av nøkrum slag, so teir tóktust í øllum førum áhugaðir.

### Fer til Tjaldur

Mánadagin skuldi Mortan so vera í føroya-flogfarinum, og tó at ein slík avbjóðing sum tann, sum hann júst nú hevur havt, er sera stór, so tykist tað ikki soleiðis, at strikuspælarin nú bert situr og bíðar eftir, at íslendingarnir aftur fara at ringja.

- Nei. Slettis ikki. Skuldi onkur áheitan komið, so var tað sjálvandi nakað, sum eg hugsaði um, men tað er tó ikki bara sum at siga tað. Fyri fyrst farið eg so at spæla við Tjaldur, og so mugu vit bara síggja, hvat fer at henda.

- Tað er í øllum førum soleiðis, at tað skal helst nakað til, áðrenn eg farið av landinum at spæla hondbólt. Sjálvandi kann talan verða um eina stóra avbjóðing, men tað eigur so altíð at haldast upp ímóti tí uttan fyri vøllin. Har havi eg jú alt, sum eg vil hava, í Runavík.

- Ikki tí at mær ikki dámdi væl í Íslandi. Tað gjørdi eg, og eg kundi væl hugsað mær at roynt hetta aftur, men tað vil so altíð verða ein spurningur um, hvørjar treytir tú fært bodnar, sigur Mortan Hansen at enda.


Mortan Hansen keigdi sær fótin, nú hann skuldi royna at fáa sáttmála í Íslandi, so í fyrsta umfarið gjørdist tað í øllum førum av ongum

# Stjørnan fer at royna


*Hóast hon enn eigur síni bestu hondbóltsár til góðar, so er líkt til, at Una Olsen í vetur fer at teljast millum berandi kreftirnar á Stjørnu-liðnum, sum hevur havt eina ógvusliga spælarafrágongd seinnu árini*

**Fleiri av teimum, sum annars eru givnar við hondbóltinum í fremstu røð taka nú á, soleiðis at fyrstudeildarhondbóltur eisini verður í Klaksvík komandi veturin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Herfyri vistu vit at siga frá, at tað var álvarsligur vandi fyri, at Stjørnan í Klaksvík ikki fekk mannað lið til komandi hondbóltslandskappingina.

Orsøkin var heilt einfalt, at tilgongdin í felagnum ikki stendur mát við frágongdina. Fleiri av teimum, sum áður hava mannað besta liðið - og sum vóru føroyameistarr fyri hálvum triðja ári síðani - eru ikki longu í Føroyum. Kreppan av álvara gjørd sjónlig, tá felagið so eisini kallaði til fundar, har gerast skuldi av, hvørt kvinnuliðið yvirhøvur skuldi taka lut í kappingini, men so álvarsligt gjørdist tað ikki kortini.

Geir Wardum er formaður í hondbóltsdeildini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag, og tó at hann er alt annað enn fegin um støðuna, so ásannar hann tó, at tað er ein lætti, at felagið hóast alt fer at taka lut í kappingini.

- Vit hava í øllum førum gjørt av at gera eina roynd til tess at skava eitt lið saman, men tað verður so langt ífrá talan um eitt lið, sum kemur at gera vart við seg í oddinum av landskappingini, heldur hann.

- Av liðnum frá í fjør eru eitt nú Bára Skaale, Joan M. Joensen og Beinta Klakkstein burtur, eins og tað er ivasamt, um Anna Kristina Samson fer at hava stundir til hondbóltin, so tað sigur seg sjálvt, at tað verður trupult. Í roynd og veru eru tað bert Una Olsen og Agnes Masenaite, sum eru eftir av liðnum, so tað sigur seg sjálvt, at tað er sera tunnligt við fólki.

Spurdur, hvørjir leikarar tað so verða, sum fólk fara at síggja á liðnum hjá Stjørnuni í ár, sigur Geir, at tað verður ein blanding av teimum eldru, og so útlendskari tilgongd.

- Vit hava gjørt avtalau við tvær jugoslavikar kvinnur, sum skulu hendavegin, Daniela Erkovic og Netasha Spanenkovic, og so verður talan um leikarar, sum annars eru givnar í bestu røðini, men sum hava játtað at taka eitt tak kortini.

Viðvíkjandi útlendsku leikarunum, so leggur Geir afturat, at hóast avtala er gjørd um at tær koma til Føroya at spæla, so tykist tað kortini ganga meira enn striltið at fáa øll formligu viðurskifitni avgreidd. Í løtuni liggur umsóknin um arbeiðs- og uppihaldsloyvi hjá danska Udlændingestyrelsen, men hann vónar kortini, at hetta kemur í rættlag, soleiðis at tær hava møguleika at venja eitt sindur, áðrenn kappingin byrjar um fýra vikur.

- At fáa føroyskarar leikarar at koma til Klaksvíkar at spæla, tykist í øllum førum vera púrasta vónleyst, so skulu vit hava tilgongd, so má talan vera um útlendskar leikarar.

### Hevur tað ikki gott

Yvir høvur heldur Geir annars, at føroyskur hondbóltur – og serliga hjá kvinnunum - ikki hevur tað serliga gott í løtuni.

Hyggur tú at ymsu feløgunum, so eru tað at kalla bert tey í Havn, sum ikki hava trupulleikar við at finna fólk. Hjá okkum gjørdist kreppan kanska eyka sjónlig, nú vit høvdu fund um málið, men veruleikin er, at flest øll feløg uttan fyri miðstaðarøkið hava trupulleikar av at manna liðini, og tað er stórt spell.

- Her hjá okkum er støðan til dømis tann, at fyrstu leikararnir, sum eru á veg upp, eru tær, sum í løtuni manna gentur-16, og tað verða so helst eini tvey til trý ár, áðrenn tær eru búnar til bestu deildina, so fyrst og fremst ræður bara um at manna lið komandi árini, sigur Geir Wardum at enda um støðuna hjá hondbóltinum í Klaksvíkini.



NSÍ-FS Vágar 0-4 (0-1):

# Bert eitt stig restar

**Tað er nú bert ein spurningur um formalia, áðrenn FS Vágar aftur er í bestu deildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað hevur tókst greitt alt árið, at vágamenn hava havt tað sterkasta liðið í næst bestu føroysku fótbóltsdeildini, og nú tykist tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn hesin veruleikin verður staðfestur.

Leygardagin vitjaðu vágamenn í Runavík, og eins og tað hevur verið galdandi seinastu nógvu umførini, so endaði tað aftur hesa ferð við trimum stigum til Vágarnar.

Fyri steðgin kom bert tað eina málið, og syrgdi John Johannesen fyri hesum. Seinna umfarið kundu Sonni Johansen, Jens Erik Rasmussen og Elfinn Ørvarodd tryggja sigurin, og nú kunnu vágafólk helst gleða seg uppflytingarveitsluna, sum eftir øllum at døma verður hildin, tá lerirvíkingar koma vestur at spæla komandi vikuskifti.

### Eru vísir

Sjálvandi skulu teir ikki kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur, og enn kann tað í teoriini ganga galið, men so er eisini alt sagt.

Sum støðan er á stigatalvuni, so er munurin niður til sumbingar, sum er næsta liðið av teimum kunnu flyta upp, 12 stig. Og við fýra dystum eftir skal tað ganga verri enn av skriðjuni til, um oddasessurin ikki skal varðveitast.

Og sum vit áður hava nevnt, so tykjast vágamenn eisini betri fyri til tilveruna í bestu deildini, enn teir gjørdu, tá liðið í fjør noyddir úr bestu deildini. Fyrst og fremst tí felagið í ár fekk tilgongd av fleiri leikarum, sum áður hava verið í útlegd aðrastaðni, umframt at tveir brasiliumenn eisini vórðu fingnir til vega.

Og við útlitum fyri einum komandi undirsjóvartunnili er einki at siga til, at fótbólturin eisini væntar sær betri kor. Tá verður tað í øllum førum meira ómaksleyst hjá leikarum, sum arbeiða í miðstaðarøkinum, at koma vestur til venjingar og dystir, og megnar felagið framyvir at steðga útflutninginum av leikarum, sum annars hevur eyðkent seinnu árini, so fer brádliga at síggja heilt ljóst út.

**NSÍ-FS Vágar 0-4(0-1)**
0-1: John Johansen
0-2: Sonni Johansen
0-3: Jens Erik Rasmussen
0-4: Elfinn Ørvarodd

# Skotarnir koma

**Tað er ikki sørt, at skotskir miðlar sýna komandi dystinum millum Føroyar og Skotland ans, og yvir høvur tykist fatanin vera, at skotar als ikki skulu rokna við nøkrum løttum dysti**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað er sjáldan, at útlendski áhugin fyri einum føroyskum landsdystir er somikið stórur, sum nú Føroyar komandi vikuskifti skulu taka ímóti Skotlandi.

Í farnu viku hava mest sum øll tey stóru bretsku bløðini havt drúgvar greinar um Føroyar og føroyska liðið, og fleiri teirra hava eisini havt tíðindafólk her á leiðini, sum hava gjørt samrøður við leikarar og onnur, sum varða av føroyska landsliðnum. Eisini her á Sosialinum hava vit merkt hendan áhugan, og farnu vikuna mundi valla fara ein dagur framvið, uttan at útlendsk tíðindafólk ringdu, og vildu hava upplýsingar um føroyska landsliðið.

### Óttast

Og tað er ikki sørt, at skotar bera ótta fyri, hvussu úrtøkan fer at verða á Svangaskarði leygardagin.

Síðani Berti Vogts avloysti Craig Brown í venjarasessinum, hevur skotska landsliðið tapt fimm dystir á rað, og tó at hetta hevur verið móti sterkari tjóðum enn Føroyum, so tykjast skotarnir ikki álvuligir. Ikki minst orsakað av góðu føroysku úrslitunum, tá vit seinast vóru í bólki við skotum. Ta ferðina endaði dysturin á Svangaskarði javnur, 1-1, meðan talan í Skotlandi gjørdist um tepurt føroyskt 2-1 tap.

Enn eru miðlarnir ikki farnir at krevja landsliðsvenjarin, Berti Vogts, úr starvinum, men tað er lítið at ivast í, at hetta fer at standa ovarliga á breddanum, um talan ikki verður um sigur á Svangaskarði.

Sjálvur tykist Vogts tó ikki óttast eina slíka lagnu, men roynir heldur at leggja dentin á, at skotska liðið í løtuni er í eini nýggjari fasu, har tað fyrst og fremst ræður um at smíða eitt nýtt lið saman, sum í framtíðini kann vera við til stórar altjóða avbjóðingar.

Hann hevur tó fylgt væl við, hvussu føroyska liðið hevur staðið seg, og millum annað var høvuðsvenjarin hjá skotsku U-landsliðunum, Jim Sinclair, í Føroyum, tá okkara menn vunnu 3-1 á Liktenstein.

Sambært blaðnum, the Scotsman, sigur Sinclair um føroyska liðið, at spælið ikki er eins lívligt, sum tað var fyri trimum árum síðani, og eisini heldur hann, at tað kann verða ein fyrimunur fyri skotar, at spæliskipan okkara nú er broytt til 4-4-2. Hetta tí hann roknar við, at føroyska liðið nú í minni mun fer at leggja dent á verjufótbóltin. At enda sigur Sinclair, at teir leikarar, sum skotar serliga skulu ansa eftir, eru Jón Rói Jacobsen, Jákup á Borg og Helgi L. Petersen.

### Venja móti unglingum

Eftir at flestu leikararnir hava verið í dysti fyri feløg síni um vikuskiftið, savnaði Berti Vogts hópin sær mánadagin, og tað er longu greitt, hvussu upplegg hansara til dystin verður.

Sambært the Scotsman, so hevur venjarin longu gjørt greitt, at skotska liðið í mestan mun skal royna at spjaða spælið væl út á vengirnar, soleiðis at føroyska verjan verður tagað sundur. Og til endamálið hevur hann fingið skotska U-18 liðið at spæla móti A-landsliðnum, har unglingarnir skulu halda seg til føroysku spæliætlanina verður sagt. Hvussu hetta so skal skiljast...

Kanska ber hetta boð um eitt ávíst slag av arrogansu, at skotskir unglingar soleiðis verða nýttir til venjingarnar, og yvirhøvur tykist tað so, at Berti Vogts hóast alt ikki hevur stórvegis virðing fyri føroyska liðnum. Sum skilst hevur venjarin nevnliga boðað frá, at talan bert verður um eina venjing, meðan liðið er í Føroyum, og at hann als ikki áhugaður í at venja á Svangaskarði undan dystinum!

